# Tað nyttar ikki at seta seg at gráta

**– Eg kann ikki siga, at eg eri bjartskygdari um støðuna hjá Suðuroynni eftir fundin við Landsstýrið mikudagin. Hinvegin hendi heldur onki, sum fær meg at síggja svartari uppá tað, sigur Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*


*– Vit fóru ikki á fund við Landsstýrið fyri at biðja um sosialhjálp úr landskassanum, sigur Viberg Sørensen, sigur Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráði, sum situr í stólinum fremst á myndini. Mikudagin hevði Oljuvinnuráðið fund við landsstýrið um framtíðina hjá Suðuroynni. Her eru tað f.v. Høgni Hoydal, varaløgmaður, Tummas Thomsen, nevndarlimur í oljuvinnuráðnum, heilsar uppá Eyðun Elttør, landsstýrismann í oljumálum og ytst til høgru, Anfinn Kallsberg, løgmaður*
*Mynd: J.Kr. Vang*

Tað kom ikki nógv burturúr fundinum, sum Suðuroyar Oljuvinnuráð hevði við landsstýrið mikudagin.

Eftir, at tað varð greitt, at Drelnes er vrakað sum oljuhavn, hevur Suðuroyar Oljuvinnuráð biðið um fund við Landsstýrið at viðgerða framtíðarmøguleikarnar í Suðuroynni.

Ein fundur var herfyri og ein fundur var aftur nú mikudagin.

– Eg veit ikki hvat eg skal siga. Tað er synd at siga, at eg bleiv stórt bjartskygdari á fundinum, sigur Viberg Sørensen, formaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð.

– Men hinvegin hendi heldur onki, sum ger meg dapurskygdari um oynna, enn eg var frammanundan, leggur hann afturat.

Hann sigur, at á fundinum greiddu teir landsstýrinum frá støðuni í Suðuroynni.

– Men tað er onki nýtt í hesum og Landsstýrið veit væl, hvussu støðan í Suðuroynni er.

Viberg Sørensen sigur, at á fundinum vildi Suðuroyar Oljuvinnuráð hava at vita, hvørji stig landsstýrið ætlar at taka, fyri at fáa Suðuroynna á føtur aftur.

– Tað varð ein drúgvur fundur, tí vit vildu hava eitt svar heimaftur við okkum. Men vit mugu ásanna, at í løtuni fæst onki eintýðugt svar úr landsstýrinum.

– Tí kann ikki sigast, at fundurin fekk meg at síggja ljósari upp á framtíðina nú, enn eg gjørdi frammanundan, sigur Viberg Sørensen.

Hann sigur, at sjálva oljuhavnina varð ikki tosað so nógv um.

– Vit hava fingið púra greitt, at í fyrsta umfari er onki at gera hjá okkum í Suðuroy, tí nú vendst ikki aftur. – Men fyribils verður bara tosað um leitiskeiðið. Vit kunnu so bara vóna, at støðan verður øðrvísi, um oljuboring tekur seg upp, sigur Viberg Sørensen.

### Nyttar ikki at gráta

Viberg Sørensen leggur dent á, at teir vóru ikki farnir út úr landsstýrið at biðja um sosialhjálp úr Landskassanum.

Hann sigur, at tað einasta, suðuroyingar biðja um, er, at suðuroyingar fáa tað, sum tilkemur teimum.

– At Suðuroyggin liggur, har hon liggur, eigur ikki at vera ein bági hjá okkum, sum búgva í oynni.

– Tað gjørdu vit landsstýrinum greitt. Vit løgdu dent á, at tað einasta, vit vilja, tað er at suðuroyingar fáa somu møguleikar at liva og virka sum restin av landinum.

– Tað hava suðuroyingar als ikki í løtuni. Hann vísir m.a. á, at kappingarførið hjá vinnulívinum í vinnulívinum í Suuroynni er munandi verri enn hjá vinnulívinum í landinum annars, tí at ferðasambandið til meginøkið er so vánaligt.

–Tað er líka skjótt hjá einum virki norðanfjørðs at senda fólk til Danmarkar at arbeiða, og at fáa tey til húsar aftur, sum tað er hjá einum virki í Suðuroy at senda fólk norðureftir at arbeiða- ella hjá einum virki norðaneftir at senda fólk til Suðuroyar at arbeiða.

– Hetta darvar kappingarførinum hjá vinnulívinum í Suðuroynni nógv. Tí er samferðslan við miðstaðarøkið ein avgerandi fyritreyt, skal Suðuroyggin mennast aftur.

– Tí hava vit alla tíðina ført fram, at verður oljuhavnin ikki løgd í Suðuroynni, hevur vinnulívið í Suðuroynni ongan møguleika at koma upp í part, tí samferðslan ger tað ómøguligt hjá tí at átaka sær arbeiði norðanfyri.

Formaðurin í Suðuroyar Oljuvinnuráð er sannførdur um, at einasti máti at fáa Suðuroyni hesar sømdir er at halda á í stríðnum fyri batnandi umstøðum- og tað má gerast í samstarvi við onnur.

– Tað nyttar ikki at suðuroyingar geva skarvin yvir og seta seg í ein krók at gráta um sína egnu ússaligheit. Vit mugu áhaldandi arbeiða fyri at bøta um støðuna og royna at ávirka landsmyndugleikarnar til at taka støðuna upp.

VIÐMERKING

# Sigið eitt syngjandi nei

**Eilif Samuelsen**

Nú fullu so gekkaskortarnir hjá fullveldistriumviratinum, og alt, sum higartil skuldi haldast so loyniligt, er nú opinberað. Og lítil skuggsjón var í. Úrslitið av trý ára fullveldisstrevi endaði við einum fullkomiliga mislukkaðum uppskoti, eins og alt fullveldisstrevið við samráðingum og propagandatiltøkum hevur verið tað, sum tey ungu nú á døgum kalla eitt flopp.

Í grundini er tað ikki so lítið harmiligt, tí sakin, tað at stremba fram ímóti sjálvbjargni fyri eitt land og fyri eitt fólk, er eitt ediligt endamál; men orsøkin til tað totala skipbrotið er, at tær kreftirnar, sum hava sett so nógv inn upp á at fáa hetta fullveldið her og nú, hava ikki bara havt tað ideala málið fyri eyga, men hava meira miðað eftir at verða sigurskransað á torginum ein vakran summardag, meðan tjøldrini láta og børnini veittra við merkinum. So nú mugu tað vera hinar kreftirnar, ið trúliga og seigliga arbeiða miðvíst fram ímóti at styrkja grundarlagið undir búskapinum og harvið skapa fyritreytir fyri veruligum sjálvbjargni, sum nú aftur mugu taka tann táttin upp, sum var sleptur fyri knøppum trimum árum síðani og føra føroysku tjóðina víðari fram á vegin.

Hesi seinastu trý árini, tá ið demagogiin hevur verið sett í hásætið heldur enn dagliga strevið fyri at menna samfelagið, hava samgonguflokkarnir lítið og einki fingið av skafti av egnum ávum. Høvdu ikki fiskanøgdir, fiskaprísir, rentustig og aðrir faktorar, sum liggja langt uttan fyri ávirkan landsstýrisins, verið so óvanliga lagaligir, so hevði støðan verið ein heilt onnur, enn hon hóast alt er í dag.

Orðloysingar hava fullveldisforsprákararnir eisini verið. Teir lovaðu Føroya fólki og løgtinginum, tá ið teir komu framat, at tann sáttmálin, sum gerast skuldi millum stjórn og landsstýri skuldi leggjast út til fólkaatkvøðu, eftir at bæði fólkating og løgting høvdu góðkent hann. Nú vita øll, hvussu tær samráðingarnar endaðu, og Nyrup verður gjørdur til syndabukk fyri klombruta og óbúna samráðingaratburð landsstýrisins. Enn rádna flestu føroyingar, tá ið teir minnast aftur á miseydnaðu sendiferðirnar og samanbera við ta hjá Jákup Sibba á sinni.

Hvat gera antihetjurnar so á flogsteininum fyri at bjarga skinninum á nøsini? Teir vilja lógartvinga komandi tríggjar løgtingsmanningarnar at fremja tær yvirtøkurnar og tær minkingarnar í ríkisveitingunum, sum teir sjálvir onga roynd hava gjørt hesi trý árini fyri at fremja. Slíkt eru kalar.

Og við at senda hesa lógina út til fólkaatkvøðu, vilja teir misbrúka føroyska veljaran og taka hann til gíðsla fyri at rættvísgera, at teir fyri alla eftirtíð bera ilt fyri fólkaatkvøður her á landi, so at tær verða at kalla ónýtiligar sum fólkaræðisligt amboð í framtíðini.

Allir føroyingar eiga at umhugsa og gjøgnumskoða ta fólkaforføring, sum liggur í hesum neyðsemjuuppskoti landsstýrisins. Sigið eitt syngjandi nei til hetta uppskotið og latið eitt komandi landsstýri gera eina skilagóða avtalu við donsku stjórnina, sum samansjóðar teir tankarnar sum liggja í Nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins og sjálvstýrisuppskoti Javnaðarfloksins.



VIÐMERKINGAR

# Takk fyri eina erliga útmelding, Høgni !

**Jóannes Eidesgaard**



Í Jyllandspostinum sunnudagin er ein long samrøða við Høgna Hoydal, landsstýrismann við heitinum "Håbet fra Hoyvík". Tað er á mangan hátt ein áhugaverd samrøða, sum blaðmaðurin, Orla Borg, hevur við landsstýrismannin, men serliga er tað eitt ávíst sitat, sum má endurtakast.

Nú vita vit politikkarar, at tað mangan kemur fyri, at ein verður skeivt endurgivin í fjølmiðlunum. Men tó eru nøkur undantøk, har vit mugu standa við tað sagda orðið. Tað er eitt nú í beinleiðis samrøðu við sjónvarp og útvarp, har sendingin fer í luftina samstundis, sum tikið verður upp. Men eisini tá blaðmenn endurgeva sagda orðið orðarætt og seta tey í gásareygu. Gásareyguni boða frá, at nú er tað ikki blaðmaðurin, sum skrivar, men tann spurdi, sum svarar beinleiðis.

Seinast í hesi góðu grein í Jyllandspostinum er eitt brot, sum ber heitið "Nu eller aldrig". Her sigur Høgni Hoydal soleiðis: "Hvis selvstændigheden ikke bliver til noget i denne omgang, mister vi fokus på at skaffe overskud i økonomien med henblik på målet om at opnå at blive selvstændige. I stedet er der en risiko for, at vi får et økonomisk tilbagefald og begynder at bruge penge på det skrigende behov for moderniseringer, der er på hospitaler, i færgenettet og andre steder i det offentlige".

Og hetta er á allan hátt ein erlig útmelding, og hetta er eisini ein hugsan, sum Høgni Hoydal hevur sín fulla rætt til at hava. Hann sigur týðiliga og greitt, at um vit ikki fáa fullveldi, so er vandi fyri, at politikkarar fara at brúka pengar til at halda samfelagið viðlíka og til at endurnýggja við. Teir leggjast búskaparliga aftur og fara at brúka pengar til at nýmótansgera sjúkrahús, ferjur og annað, sum hevur brúk fyri ábøtum í samfelganum.

Nei, hann ballar einki inn, vit fáa at vita, at í valinum millum fullveldið og so tað at halda okkara samfelag viðlíka, har vinnur fullveldið. So vita vit tað. Og fyri landsstýrismannin er tað ikki ein spurningur um bæði/og, men heldur antin/ella. Ikki bæði fullveldi og viðlíkahald og nýíløgur, men antin fullveldi ella viðlíkahald og nýíløgur.

Tað er heldur ikki uttan áhuga, at hesa støðutakan hevur landsstýrismaðurin tikið, hóast hann í sama svarið sigur, at samfelagið skríggjar eftir viðlíkahaldi og nýggjum íløgum. Men hesi skríggini hoyrast ikki, tí fullveldistrummurnar yvirdoyva hesi skríggj.

Men hetta er so gott at vita. Hetta er støðan, áðrenn avleiðingar av fullveldinum er komnar. Hetta er støðan, nú vit hava rættiligan búskaparliga viðvind og størstu heildarveiting úr danska ríkiskassanum nakrantíð. So kunnu vit sjálvi ímynda okkum støðuna, tá búskaparliga rákið gongur ímóti, og heildarveitingin er burtur.

Takk skal landsstýrismaðurin hava fyri eitt opið og erligt svar.

# Greið í mai: JA!

**Høgni Hoydal**



Fólkaatkvøðan snýr seg um júst tað, sum bæði danska stjórnin og javnaðarflokkurin hava sagt seg vilja.

Fólkið kann tí 26. mai skapa ta breiðu semju, sum politisku flokkarnir køva við smáligheitum og klandri.

Føroyska tjóðin tekur fulla ábyrgd av øllum sínum viðurskiftum eftir eini greiðari ætlan. Í seinasta lagi í 2012 skal verða nýggj fólkaatkvøða um at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

Føroya fólk velur leiðina og eigur endaligu avgerðina.

Hetta er tað, sum atkvøðast skal um 26. mai.

**Klandrið spillir**

Tað er neyðugt, at fólkið tekur avgerðina. Tí í politisku skipan okkara er eftir øllum at døma so nógv smáligheit og so nógv klandur, at eitt so týdningarmikið mál verður blakað aftur og fram.

Vit hava roynt at fingið semju við donsku stjórnina um ein sáttmála, har londini samstarva um at byggja upp eitt sjálvstøðugt føroyskt samfelag. Tað bar ikki til – fyrst og fremst tí, at danska stjórnin vil ikki einar sjálvstøðugar Føroyar og tí at politisku flokkarnir ikki standa saman í Føroyum.

**Taka uppá orðið**

Men boðini hava verið endurtikin úr Danmark: Føroya fólk eigur avgerðina. Og meira sjálvstýri merkir minni pengar.

Tað er júst henda boðskap, sum vit nú taka uppá orðið.

Boðini frá javnaðarflokkinum í Føroyum hava verið: Vit vilja vera við í fyrsta stiginum. Lat okkum yvirtaka øll málsøkir og ta fíggjarligu ábyrgdina yvir eitt áramál. So er ongin dramatikkur, tá vit skulu taka tað endaliga stigið.

Tað er júst hetta, sum nú liggur á borðinum.

**Eitt rungandi JA!**

Tí er tað beinleiðis óskiljandi, at fyrstu meldingarnar frá javnaðarflokkinum og úr Danmark eru ein hørð mótstøða móti innihaldinum í fólkaatkvøðuni.

Men 26. mai kann Føroya fólk siga øllum donskum og føroyskum politikarum: Standið nú við tykkara egnu orð!

Vit eru greið í mai. Vit siga eitt rungandi JA!

Tí tað er okkara land.

# Eiga at atkvøða nei í mai

TÍÐINDASKRIV

Floksleiðslan hjá Javnaðarflokkinum, sum er umboð fyri øll limafeløgini runt landið, umboð fyri SU saman við starvsnevnd og tingmanning floksins, hevur á fundi í Havn í dag viðgjørt uppskot landsstýrisins um eina fólkaatkvøðu 26. mei 2001 um eina lóggávu, sum fyriskipar og tíðarfestir allar yvirtøkurnar, og hvussu heildarveitingin verður minkað burtur í einki.

Floksleiðslan tekur fult undir við støðutakanini hjá tingmanningini um at ráða egnum limum og øllum føroyingum til at atkvøða nei í mei.

Høvuðsgrundgevingarnar fyri hesari støðu er, at floksleiðslan metir,

– at ein fólkaatkvøða ístaðin fyri eina ætlan og tíðarfesting heldur eigur at vera um ein lidnan sáttmála, sum loysir ógreiða ábyrgdar- og valdsbýtið millum Føroyar og Danmark

– at fólkaatkvøðan í mei í veruleikanum snýr seg um eina tíðarásetta loysing

– at tað er í andsøgn við alla okkara demokratisku uppfatan, at eitt Løgting avmarkar og fastleggur virkismøguleikarnar hjá í minsta lagi trimum komandi løgtingum

– at tað er ábyrgda-leyst í dag at siga, nær stórar politisku avgerðir, sum hava stórar fíggjarligar, umsitingarligar og politiskar avleiðingar, skulu setast í verk, uttan at taka hædd fyri skiftandi búskaparligu fortreytum, sum føroyskur búskapur altíð hevur livað undir

– at tað er ábygrdaleyst at leggja byrðar á føroyska umsiting, sum hon ongar møguleikar hevur fyri at loysa á ein nøktandi hátt

– at tað er ein stór andsøgn í tí, at eitt landsstýri, sum onga yvirtøku hevur framt, nú skal áleggja eftirtíðina, nær allar yvirtøkur skulu fremjast

– at tað er ein stór andsøgn í tí, at eitt landsstýri, sum onga krónu hevur skorið av heildarveitingini, nú skal áleggja eftirtíðina, hvussu hesin skal minkast burtur í einki

Í staðin verður staðiliga mælt til, at yvirtøkurnar heldur verða framdar við støði í okkara til eina og hvørja tíð galdandi fyristingarliga og fíggjarliga førleika, og at ítøkiligar ætlanir hesum viðvíkjandi hjá einum landsstýri bert fevna um egna arbeiðsskeið, sum er eitt valskeið.

Tórshavn 3. februar 2001
Føroya Javnaðarflokkur


3 góðar orsøkir til at velja Hyundai Accent
[ kostnaður, útgerð og komfort ]



Hyundai Accent er kendur millum fólk sum familjubilurin, ið loysir seg best fíggjarliga. Eingin í hesum klassa bjóðar so nógva útgerð og hentleikar fyri sama pening. Hyundai Accent er sterkastur á øllum økjum.

Rúmliga kabinu * Roynist væl fíggjarliga * Høgligur * 4 airbags * Stóran motor * Aircondition [standard]

Hyunda Accent hevur vunnið sær sess ímillum teir ítastu á »Top 20« sølulistanum í ár. Men góðskan tosar eisini fyri seg: Klassiskur í sniði, fimar koyrieginleikar og framúrskarandi trygd.

Hyundai Accent úr kr. 114.750,-

Nú er 4 airbags standardur



3 ár/100.000 km fabrikksgaranti umframt 6 ára garanti móti rusti

HONDA NORDBIL SKODA Volkswagen Group HYUNDAI
Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855

Sosialurin - 311820